# Starvslýsing

Søkt verður eftir venjara til 1. manslið hjá ÍF Føroyum fótbólti.

Hevur tú ein venjara í búkinum? Ella ynskir tú nýggjar avbjóðingar? Hygg so her!

ÍF Føroyar fótbóltur leitar í løtuni eftir nýggjum venjara til 1. manslið at taka við 15. august 2016, og nú hevur júst tú møguleikan.

Starvið og førleikar:
Sum venjari hjá 1. manslíðnum hjá ÍF Føroyum hevur tú høvuðsábyrgdina av mannafólkavenjingini saman við 2. liðsvenjaranum. Vant verður tvær ferðir um vikuna umframt, at dystur er um vikuskiftið. Sum 1. liðsvenjari ert tú andlit felagsins og umboðar felagið úteftir.

Øll, sum hava áhuga, kunnu søkja starvið, men venjaraútbúgving og royndir, sum venjari, eru ein fyrimunur.

Setan:
Setanin er ein heildarmeting og verður sambært avtalu millum felag og venjara.

Samsýning og setanartreytir:
Verður avtalað partanna millum.

Nærri upplýsingar um starvið:
Hevur tú spurningar ella vilt vita meira um starvið, kanst tú seta teg í samband við formann felagsins Ólav S. í Ólavsstovu við at senda ein teldupost á olavur@fotboltur.dk

Umsókn:
Umsókn við CV, venjaraprógvum og viðmælum skulu sendast til nevnd@fotboltur.dk í seinasta lagi fríggjadagin 15. juli 2016.

Stutt um felagið:
ÍF Føroyar er eitt fótbóltsfelag fyri føroyingar í Keypmannahavn. Felagið varð stovnað 4.apríl í 1939 og hevur tí eina ríka søgu, har alskyns føroyingar hava slitið sínar fótbóltsskógvar millum ár og dag. Dentur verður lagdur á sterkt samanhald, har ið viljin at vinna og sosial samvera við øðrum føroyingum er í hásæti.

ÍF Føroyar Fótbóltur – Nevndin
nevnd@fotboltur.dk www.fotboltur.dk